Søljan-Stjørnan 19-25 (11-12):

# Rustaðar Stjørnur

**Stjørnan tóktist merkt av vantandi dystarvenjingini, men tær fingu tó togað ein sigur heim móti Søljuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur ikki so nógv verið spælið á vøllinum, sum hevur eyðkent Stjørnuna seinastu tíðina. Heldur hevur tað verið mangul upp á sama, nú liðið tvær ferðir á rað hevur verið rakt av avlýsingum. Nakað sum hevur fingið bæði spælarar og venjara at ilskast um, at vantandi dystarvenjingin kundi raka liðið meint, nú nakrir truplir dystir stóðu fyri framman.

Og fyrstu løtuna á Giljanesi tóktist eisini nakað at vera um hetta tosið. Søljan legði bragdliga frá byrjan. Tær stríddust væl í verjupartinum, soleiðis at Stjørnan ikki slapp framat, og í álopspartinum royndu tær at halda høvdið kalt.

Og tað gav eisini at bíta. 10 minuttir gingu, áðrenn Stjørnan skoraði fyrstu ferð, og tó at tað nú tóktist ganga framá, so stóð 9-3 á talvuni, tá tveir triðingar av hálvleikinum vóru farnir.

Stjørnan hevði tá júst gjørt nýtslu av sínum time-out, og so fingu tær brádliga ferð á. Verjuspælið fór knappliga at ganga nakað væl betri, seks málum upp á eins nógvar minuttir, vóru tað nú brádliga tær, sum vóru á odda.

**Orkan á muni**

Fram til steðgin gekk so nakað javnt á, og søgan var hin sama, fyrsta góða korterið eftir steðgin.

Seinastu løtuna kom tó til sjóndar, hví Stjørnan í løtuni er liðið, sum hini skulu vinna á, um vónir skulu gerast um nakað gullmerki. Sum tær so ofta áður hava prógvað tað, so hevur liðið bæði neyðugu orkuna og nóg sterkar nervar, tá farast skal undir seinasta partin av dystinum.

Fimm mál á rað at kalla pumpaðu bæði luft og sjálvsálit úr Søljuni, og so var leyst og liðugt. Stjørnan hevði enn einaferð avgjørt ein hondbóltsdyst seinasta korterið, og við hesum sigrinum er helst einki at ivast í, at tær í hvussu so er enda næstovast, tá grundspælið skal gerast upp.

Um endastøðan so verður heilt ovast, fara fyrst og fremst heimadysturin móti VB og útidysturin móti Neistanum at gera av.

Hjá Søluni tykist spurningurin hinvegin vera, hvørt liðið skal megna at bjóða Neistanum av í stríðnum um bronsukrónurnar. Enn eiga tær so heimadystin móti Neistanum á í grundspælinum, og tann dysturin fer ivaleyst at geva eina heilt góða ábending í so máta.

## FAKTA UM DYSTIN

**Søljan-Stjørnan 19-25 (11-12)**
**Málskjúttar**
**Søljan:** Lina Andriulyte 8(2), Heidi Maria Akselsen 3, Nicoleta R. Hansen 3, Arnleyg Haraldsen 2, Hertha J. Simonsen 2, Fía Selma Nielsen 1
**Stjørnan:** Una Olsen 6, Joan M. Djordjevic 6, Annika Ljósstein 4(4), Beinta Joensen 3, Anna Kristina Samson 2, Louisa Andreasen 2, Katarina Stepanov 1, Bára S. Klakstein 1
**Brotskøst:** Søljan 6, Stjørnan 4
**Útvísingar:** Søljan 4, Stjørnan 2
**Dómarar:** Kristian Johansen & Dánjal Samuelsen

VÍF-Kyndil 25-11 (11-5):

# Trygt hjá VÍF

**Hóast mansverju av Ioanu Rápa, so eydnaðist ongantíð hjá Kyndli at fáa spenning í dystin móti VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Eina løtu tóktist ganga rætta vegin hjá Kyndli, men so strammaði VÍF takið, og tá var ikki nógv meira at tosa um*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ioana Rápa var um nakar munurin, tá Kyndil og VÍF dystaðust í Havn í fyrra dystinum sínamillum í grundspælinum. Ta ferðina skeyt stórskjúttin hjá VÍF 18 mál, og ta søguna vildi Kyndil so ikki hoyra umaftur, tá liðini hittust í Vestmanna sunnudagin.

Frá fyrsta bríksli royndu tær at taka Ioanu úr spælinum, og fyrstu løtuna tóktist hetta eisini at geva úrslit. Kyndil var á odda 3-1, tá níggju minuttir vóru farnir, men so gekk alt av skriðjuni til. Eftir eitt time-out broytti VÍF verjuna til eina 5-1, so Randi Wardum ikki skuldi sleppa so væl framat at skjóta, og so var mest sum liðugt hjá Kyndli. Tær vórðu tvingaðar at skjóta útifrá, og við Manuelu Stan í málinum, var hetta ikki nakað, sum gav VÍF stórvegis trupulleikar.

Samstundis borgaði hetta fyri, at Manuela kundi nýta kanska vandamesta vápn sítt, tá hon ferð eftir ferð sendi viðleikarar í skjótálop, ella við eini neyvari sending alt fyri eitt legði trýst á Kyndils-verjuna.

At munurin so ikki gjørdist størri enn tað sama, kann Kyndil fyrst og fremst takka sínum málverja fyri. Guðrun í Lágabø hevur í ár víst seg sum sannur fongur hjá Kyndli, og aftur hesa ferð prógvaði hon, at hon avgjørt telist millum bestu málverjarnar í landinum.

Við sigrinum kom VÍF upp á fimta plássið, har tær nú eru ájavnar Søljuni í stigatali. Um tann støðan fer at halda, er so ein annar spurningur.

Kyndil er hinvegin framvegis partur av botnstríðnum, har tað fyrst og fremst er í dystunum móti StÍF og Tjaldri, at stigini skulu fáast til høldar.

## FAKTA UM DYSTIN

**VÍF-Kyndil 25-11 (11-5)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Fríða Marjunardóttir 5(1), Finngerð Jensen 5, Eyðritt Andreasen 4, Alis Høghamar 3, Linda Johannesen 2, Ioana Rápa 2(1), Annfríða Helgadóttir 2, Manuela Stan 1, Kirstin Helgadóttir 1
**Kyndil:** Randi Wardum 7(4), Súsanna Petersen 2, Linda Weihe 1, Hildur Mikkelsen 1
**Brotskøst:** VÍF 6, Kyndil 8
**Útvísingar:** VÍF 4, Kyndil 3
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen. Komu væl frá uppgávuni, sum tó heldur ikki var ov trupul

# Fýra nýggj met til Elspu

**Elspa Mørkøre úr Fuglafjarðar Svimjifelag seti fýra nýggj met um vikuskiftið. Eisini vórðu tvey bólkamet sett**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Stórkappingin er størsta svimjitiltakið hesumegin jól í hesum kappingarárinum*

*Mynd: SáH*

Tað tykist ikki valda nakar ivi um, at eitt tað mest spennandi føroyska svimjinavnið í løtuni er Elspa Mørkøre úr Gøtu.

Hon hevur longu fleiri ferðir í vetur sett nýggj met, og nú stórkapping varð hildin í Leirvík og Klaksvík, komu enn fýra av slagnum. Hesaferð vórðu metini í 100m blandað við tíðini 1.09.92, 100m rygg við tíðini 1.07.98, eisini setti hon nýtt met í 200m frí við tíðini 2.13.93 og í 200m blandað við tíðini 2.30.19.

Eisini Kári J. á Høvdanum, sum somuleiðis svimur fyri Fuglafjarðar Svimjifelag, setti nýggj bólkamet. Í bólki 4 svam hann 50m rygg við tíðini 0.30.75 og í 100m rygg hevði hann tíðina 1.04.66.

Annars verður sagt, at luttøkan til kappingina var stór. Einir 150 svimjarar úr Tvøroyrar Svimjifelag, Vágs Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Flot, Skeggjar, Reki, Fuglafjarðar Svimjifelag og Ægir tóku lut.

Kappingin er annars býtt nakað øðrvísi, enn vit vanliga kenna tað í Føroyum. Talan er nevnliga um sokallaðar norðurlendskar bólkar, og eru luttakandi svimjararnir flokkaðir soleiðis:

Kvinnur: Bólk 2 árg 93-95 Bólk 1 árg 91-92 Junior árg 89-90 Senior árg 88 og eldri

Menn: Bólk 2 árg 91-93 Bólk 1 árg 89-90 Junior árg 87-88 Senior árg 86 og eldri

Samanlagt gjørdi Fuglafjarðar Svimjifelag størsta hálið. Tey vunnu ikki færri enn 54 gullmerkir. Samlaða býtið av heiðursmerkjum varð annars hetta:

| | G. | S. | B. |
|---|---|---|---|
| 1 FS | 54 | 21 | 9 |
| 2 HS | 47 | 33 | 30 |
| 3 Flot | 19 | 22 | 16 |
| 4 TS | 19 | 16 | 8 |
| 5 Ægir | 19 | 16 | 5 |
| 6 VS | 5 | 7 | 12 |
| 7 Skeggjar | 3 | 11 | 13 |
| 8 Reki | 0 | 3 | 6 |